# Námsferð við Norrønu til Íslands

# 08. - 11. apríl



**Mánadagur 08. apríl 2024**

Vit fara ikki í skúla, men møta á Farstøðini í seinasta lagi kl. 11.00. Eftir ætlan leggur Norrøna frá landi kl. 13.00. Landgongin verður tikin kl. 12.00

Vit kekka inn beint áðrenn vit fara umborð.

Passini og tryggingarkortini, ið tit longu hava klistrað í passini, skulu handast Boga, tá vit eru komin umborð. Tey, ið hava tørv á sjóverkstablettum, geva Boga tær at umsita. Sigið eisini frá, um tað er annar heilivágur, ið næmingarnir taka.

Umborð á Norrønu sova vit í 4-mans kømurum. Matur á morgni, middegi og náttura er íroknað tað, tit hava goldið.

**Skráin fyri dagarnar er hendan:**

**Mánadagur 08. apríl 2024**

Kl. 13.00: Miðmáli í Nóatúni

Kl. 13.00: Fráferð

Kl. 14.00: Svimjihylur, sauna og fitness hava opið

Kl. 17.00: Hitapottarnir hava opið

Kl. 17.30: Matstovurnar hava opið

Kl. 20.00: Live-tónleikur í Undirhúsinum

**Týsdagur 09. apríl 2024:**

Kl. 07.00: Morgunmatur í Skansagarði

Kl. 07.00: Svimjihylur, sauna og fitness hava opið

Kl. 10.00: Vit koma til Íslands (ísl. tíð)

Norrøna leggur at í Seyðisfirði kl. 9.00.

Kl. 07.30 eta vit morgunmat saman á Skansagarði. Takið svimjiklæði, handklæði, ryggsekk og annað, ið tit hava tørv á við.

Vit fylgjast í land og fara í buss okkara. Vit koyra til Dimmuborgir, Námaskarð og Mývatn. Her hugna vit okkum, hyggja at íslendska landslagnum og svimja í heitum undirgrundsvatni. Frá Seyðisfirði tekur tað uml. 2,5 tímar at koyra til Mývatn.

Út á seinnapartin koyra vit aftur til Seyðisfjarðar og eta náttura saman umborð á Norrønu. Eftir náttura er fríløta.

**Mikudagur 10. apríl 2024**

Vit møtast til morgunmat kl. 7.30

Kl. 9.00 fara vit í land og koyra til Vøk Baths, ið liggur tætt við Egilsstaðir. Tað tekur uml. 45 min at koyra frá Seyðisfirði. Her hugna vit okkum nakrar tímar. Á veg heimaftur steðga vit á Egilsstøðum at keypa.

Vit vera aftur á Norrønu kl. 18.00.

Kl. 20.00 leggur hon frá landi.

**Hósdagur 11. apríl 2024**

Vit sova nakað longri, men í seinasta lagi kl. 9.00 skulu vit eta morgunmat. Vit hava fríløtu fram til kl. 16.00, tá Norrøna leggur at í Tórshavn.

*At minnast til:*

Á ferðini umboða vit Føroyar, Skúlan við Løgmannabreyt, okkum sjálvi og foreldur okkara. Latið okkum umboða hesi væl!

Vit eru umborð á Norrønu saman við nógvum øðrum ferðandi úr nógvum londum. Vit kunnu tí ikki tuska og spæla, sum vit vilja. Vit muga vísa virðing fyri øllum við góðum atburði

Í seinasta lagi kl. 00.00 eru øll í sínum kamari. Summi vilja sova - og tað skulu tey sleppa.

*Hetta skulu tit hava við:*

Pass, tryggingarkort og lummapengar við skili.

G.G. Allur matur umborð, matpakkar til útferðir og felagstiltøk, so sum Mývatn og svimjing er goldið. Tit avgera sjálvi, um lummapeningur er í reiðum peningi ella á korti.

Toiletlutir.

Hóskandi klæðir til útferðir og svimjing.

Lítlan ryggsekk til útferðirnar.

Kort- og borðspøl.

Tað er loyvi at hava fartelefon við, men tað er sera umráðandi, at vit eru “saman á túrinum.” Meta vit lærarar, at telefonin fer við ov nógvari tíð, samla vit telefonirnar inn.